Eyðun Elttør:

# Tosaðu um umhvørvi heldur enn olju



*Eyðun Elttør var sum so mangur annar væl nøgdur við vitjanina hjá Anders Fogh Rasmussen. Teir báðir tosaðu tó mestsum einki um olju*

**– Oljan var ikki tikin upp á tungu á fundinum. Heldur vóru tað umhvørvismál, ið vit prátaðu um, sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður og formaður fyri Sjálvstýrisflokkin, nú hann hevur fingið høvi at tosa við danska forsætisráðharran**

VITJAN
*Heri á Rógvi*

Tað var við at nærkast eitt um nýggjum degi, tá vit hittu Eyðun Elttør í telefonini. Júst afturkomin frá borðhaldið, har danski forsætisráðharrin hevði verið heiðursgestur.

– Eg eri glaður fyri vitjanina. Vit fingu prátað væl saman, og hann var eisini ógvuliga kontantur í sínum úttalilsum, sigur Eyðun Elttør.

Sjálvur er Eyðun Elttør landsstýrismaður í olju- og umhvørvismálum, og hann var fyri kortum eisini valdur sum formaður fyri Sjálvstýrisflokkin.

Hóast umhvørvismál ikki er tað, ið vit eru von við at hoyra Eyðun Elttør tosa mest um, var tað hetta, ið hann tók upp, tá ið danski forsætisráðharrin sat hinumegin borðið.

– Við sjálvt borðhaldið nevndi Anders Fogh Rasmussen, at hann var fegin um, at føroyingar nú høvdu fingið góð úrslit í oljuleitinguni, men annars var ikki eitt orð talað um oljuna okkara millum, sigur Eyðun Elttør.

Í staðin fyri at tosa um olju, var tað sostatt einamest havumhvørvið, sum Eyðun Elttør tosaði við ovasta danska politikaran um.

Havumhvørvið er eitt málsøki, ið enn ikki er yvirtikið, og sum støðan er nú, liggur ein stórur partur av førleikanum í Danmark.

Føroyski olju- og umhvørvismálaráðharrin greiddi Anders Fogh frá, at føroyingar fegnir vildu yvirtaka hetta málsøki eisini. Sjálvur er Eyðun Elttør eisini rættiliga væl nøgdur við svarið, hann fekk.

– Eg fekk eitt positivt svar. Eg skal taka hetta málið við danska umhvørvismálaráðharran (Hans Christian Schmidt úr Venstre, blóm), sum er nýggjur í starvinum, og tað verður so upp til okkum at fáa hetta í rættlag, sigur Eyðun Elttør.

Landsstýrismaðurin heldur, at flest allir landsstýrismenn fingu líknandi positiv svør upp á sínar fyrispurningar frá danska forsætisráðharranum.

Á tíðindafundinum hjá Anders Fogh Rasmussen og Løgmanni, Anfinn Kallsberg, varð eisini spurningurin um undirgrundini reistur.

Eyðun Elttør metir, at svarið frá danska forsætisráðharranum til spurningin um undirgrundina er í tráð við tað, ið hevur verið frammi fyrr, og hetta staðfestir avtaluna millum Føroyar og Danmark.

Sjálvur metir Eyðun Elttør ikki, at Anders Fogh Rasmussen hevur í hyggju at skipa soleiðis fyri, at blokkurin skal avtakast við oljupengunum sum høvuðsgrundarlagið.

### Passar til flokkin

Sum floksformaður dámar Eyðuni Elttør eisini væl Fælleserklæringen, Anders Fogh og Løgmaður lótu frá sær.

– Mann kann gott siga, at eg eri fegin um hetta. Hetta skuldi borið í sær, at tað fer at bera til at fremja yvirtøkurnar. sigur Eyðun Elttør.

Hann heldur, at hetta við yvirtøkunum passar væl til flokkin og tað, ið flokkurin hevur sagt áður.

– Vit kunnu sjálvsagt seta spurnartekin við, hvussu væl eydnaðar yvirtøkurnar hava verið higartil, men nú eiga vit at hyggja frameftir. Vit hava tørv á góðum samstarvi í staðin fyri klandri, sigur Eyðun Elttør at enda.

# Høgni fegnast

*Høgni Hoydal er fegin um útspælið frá donsku stjórnini*



**–Vit hava tikið eitt sjey míla fet við nýggja útspælinum frá dønum, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í í sjálvstýrismálum**

VITJAN
*Heri á Rógvi*

Høgni Hoydal er væl nøgdur við vitjanina hjá Anders Fogh Rasmussen í Føroyum. Hann undirstrikar, at hetta er eitt stórt fet fyri fullveldistilgongdina.

– Vit hava tikið eitt sjey míla fet við nýggja útspælinum frá dønum, sigur Høgni Hoydal, sum heldur, at sum støðan er nú, so eru Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin taparnarnir av vitjanini hjá Fogh. Hevði Javnaðarflokkurin hildið fast við tað, ið teir søgdu undan valinum í 98, so varð komið heilt langt í fullveldistilgongdini, leggur Høgni afturat.

Aðrir hava ført fram, at fullveldistilgongdin verður steðgað við alla við hesari avgerðini, men hetta heldur Høgni Hoydal vera púrasta burturvið.

– Hetta er heilt tvørturímóti. Hetta er í veruleikanum júst sama uppleggið, ið varð skotið upp í sambandi við ætlaðu fólkaatkvøðuna í maj, og nú hevur danska stjórnin eftir øllum at døma góðtikið hetta, sigur Høgni Hoydal.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum sigur seg vera greiðan yvir, at danski forsætisráðharrin við hesum ætlar at fjálga um ríkisfelagsskapin og fáa føroyingar at vera verandi innanfyri.

Tað hevur verið ført fram, at bólturin liggur hjá føroyingum í løtuni. Hesum er Høgni Hoydal samdur við. Men hann hevur ligið hjá føroyingum alla tíðina, sigur Høgni.

Í pettinum í felagsfráboðanini, sum Anfinn Kallsberg og Anders Fogh Rasmussen skrivaðu undir, har tað verður tosað um, at yvirtøkurnar skulu henda innanfyri ríkisfelagsskapin og grundlógina, vísir Høgni Hoydal á, at hetta er sjónarmiðið hjá donsku stjórnini, sum hann als ikki er samdur við, men bara má konstantera.

– Vit meta ikki grundlógin sum okkara grundlóg, men bert sum eina vanliga lóg. So fyri okkum er einki broytt, sigur Høgni Hoydal.

Tá hann verður spurdur, um hetta kemur óvart á hann, og hvønn leiklut hann heldur, at komandi løgtingsvalið fær, svarar hann:

– Eg havi havt samband við politikararnir, tá ið eg var á fólkatingi, so hetta kemur óvart á meg. Komandi løgtingsval verður ein fólkaatkvøða um fullveldi og eitt lagnuval, sigur Høgni Hoydal.

Óli Breckmann:

# Allar forðingar eru burtur



*Óli Breckmann fegnast yvir, at Anders Fogh ikki ætlar at forða fyri føroyskum sjálvstýri, soleiðis sum undangongumaður hansara hevði lyndi til at gera.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**– Hetta er ein ringur dagur fyri Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin. Vit hava nú fingið greitt at vita, at vit sjálvi kunnu avgera, hvussu verður við føroyskum sjálvstýri, sigur Óli Breckmann**

VITJAN
*Heri á Rógvi*

– Hetta er ein fínur dagur fyri øll sjálvstýrisfólk. Allar forðingar eru nú burtur, og vit hava nú fingið greitt at vita, at vit sjálvi kunnu avgera, hvussu verður við føroyskum sjálvstýri, sigur Óli Breckmann.

Millum fundarluttakararnar á fundinum millum Løgtingið og Anders Fogh Rasmussen var sjálvsagt eisini Óli Breckmann úr Fólkaflokkinum. Fyrrverandi fólkatingsmaðurin hevði frammanundan vitjanini hjá Anders Fogh borið upp á mál, at hann metti Anders Fogh vera nógv meira ektaðan enn Poul Nyrup Rasmussen. Eftir fundin spurdu vit eisini Óla, um Fogh nú hevði verið meira ektaður enn undangongumaður hansara í forsætisráðharrasætinum.

– Hann er minni innviklaður enn Poul Nyrup og nógv meira beinleiðis í talumátanum, sigur Óli Breckmann.

Stóri atkvøðuslúkarin hjá Fólkaflokkinum tóktist eisini rættiliga væl nøgdur við bæði fund og vitjanina sum heild hjá Anders Fogh Rasmussen. Hann kallaði tað - eins og Anders Fogh Sjálvur – fyri eina nýggja byrjan.

– Hetta er meira í tráð við politiska veruleikan, og føroyingar hava nú møguleikan. Føroyskt sjálvstýri er ein prosess, ið vit sjálvir hava sett ígongd, og nú hava fingið staðfest, at sjálvt ein donsk Venstrestjórn ikki vil forða føroyingum at taka sjálvstýri. Hetta er ein ringur dagur fyri Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin, sigur Óli Breckmann.

Eisini tann so nógv umtalaði tónin helt Óli Breckmann vera vorðnan betri. Óli helt fyri, at Anders Fogh var munandi mildari í orðavalinum, og hann nýtti eisini vendingar, sum oftani verða nýttar fyri at slætta sjógv í politikki.

Spurdur, um hann helt, at Venstre og Fólkaflokkurin nú riggaði betri saman enn Venstre og Sambandsflokkurin, segði Óli, at hetta var sjálvsagt og hava Fólkaflokkurin og Venstre altíð hóskað betri saman enn Sambandsflokkurin og gamli bóndaflokkurin, Venstre.



Fogh við landsstýrið:

# Ja til virtøkur innan fyri Ríkisfelagsskapin

**Danska stjórnin vil ganga við til at lata føroyingar yvirtaka málsøki innan fyri karmarnar av Ríkisfelagsskapinum og grundlógini. Tað er so upp til føroyingar sjálvar at gera av, í hvussu stóran mun og við hvørjari ferð hetta verður gjørt sigur danski forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen. Hann ynskir eina nýggja byrjan í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark og heldur útspæl sítt vera ein góðan og praktiskan hátt at nútímansgera heimastýrið uppá.**



*Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri og Anfinn Kallsberg, løgmaður vælhýrdir á tíðindafundi í Tinganesi eftir at tað varð kunngjørt, at føroyingar kunnu gera yvirtøkur innan fyri karmarnar av Ríkisfelagsskapinum*

FORSÆTIS-RÁÐHARRAVITJAN
*Jan Müller*

Tað vóru tveir vælhýrdir og eftir øllum at døma ikki sørt samdir stjórnarleiðarar, sum hittust til tíðindafund í Tinganesi mánadagin. Eftir ein væleydnaðan fund, har Anders Fogh Rasmussen og Anfinnur Kallsberg skrivaðu undir eina felags frágreiðing borðreiddu teir fyri øllum Føroya fólki niðurstøðuna frá fundinum í Nesinum mánadagin.

Anders Fogh Rasmussen:

- Tað hevur frá byrjan verið mítt ynski at fáa skapt álit aftur millum Danmark og Føroyar og fáa ein virðiligan tóna í tær viðurskiftini millum báðar ríkispartarnar. Eftir tær sera positivu og konstruktivu samráðingarnar við løgmann havi eg góðar vónir um, at hetta fer at bera til.

Danski forsætisráðharrin ger greitt, at tað er Føroya fólk, sum sjálvt avger sína framtíð. Um føroyingar ynskja sjálvstýri, fer danska fólkatingið sjálvandi at góðkenna tað. -So finna vit skilagóðar fíggjarligar og fyrisitingarligar loysnir fyri tí. Men eg skal ikki dylja fyri, at tað er støðan hjá bæði stjórnini og mær sjálvum, at vit vóna, at vit eisini í framtíðini kunnu varðveita ein ríkisfelagsskap, sum eg meti vera ein felagsskap millum trý javnbjóðis fólk, tað føroyska, tað grønlendska og tað danska.

Forsætisráðharrin vísir á, at vit liva í eini menningartíð, og tað er tí náttúrligt at nútímansgera Heimastýrið innan fyri karmarnar av Ríkisfelagsskapinum. Stjórnin fer tí at vera vælviljað fyri eini slíkari nútímansgerð av heimastýrinum og vil fegin tosa við føroyingar um, hvussu heimastýrið stigvíst kann átaka sær politisku, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av málsøkjum. - Vit hava tosað um nøkur ítøkilig mál og støðan hjá stjórnini er, at føroyingar kunnu yvirtaka mál innan fyri karmarnar av ríkisfelagsskapinum í tann mun landsstýrið setir fram ynski um tað. Nógv av tí krevur so nýggja lóggávu í fólkatinginum, sum stjórnin fer at stuðla.

Anders Fogh Rasmussen sigur, at stjórnin er fús til at lata føroyingar yvirtaka løgreglu og rættarskipan, tá tað arbeiðið, sum longu er í gongd, er liðugt. Um ynski er um at yvirtaka flogvallarmálið og fólkakirkjuna, so er eisini grundarlag har at fara undir samráðingar við tí fyri eygað at finna skilagóðar loysnir.

- Eg havi skilt, at tað eisini er eitt ynski frá føroyskari síðu at kunna taka ábyrgdina av familju- og arvarætti, spurninginum viðvíkjandi útlendingalóggávuni og vinnulóggávuni.

Fyri øll økini havi eg sagt, at hóast tey í løtuni liggja uttan fyri Heimastýrislógina, so vil stjórnin ganga við til at fara undir samráðingar at fáa ta lóggávu, ið skal til eina yvirtøku, um hetta er eitt føroyskt ynski. Tað fer so at henda út frá tí prinsippinum, at í tann mun økini verða yvirtikin, so verður blokkurin lækkaður samsvarandi, soleiðis at fíggjarliga ábyrgdin kemur at liggja í Føroyum sigur Anders Fogh Rasmussen.

### Ríkisfelagsskapurin

Hann vísir annars á, at tað er umráðandi at Ríkisfelagsskapurin hevur tað gott, og tí vilja danir eisini virða føroysk ynski um at yvirtaka mál. -Ríkisfelagsskapurin verður styrktur av at vit finna skilagóðar og pragmatiskar loysnir. Seta føroyingar tí við eina fólkaatkvøðu ynski fram um at gerast sjálvstøðug tjóð, so fara vit sjálvandi at virða tað. Men mítt ynski er, at vit kunnu varðveita Ríkisfelagskapin. Og hann verður sterkastur, tá føroyingar sleppa at yvirtaka tey mál, sum eru innan fyri karmarnar av hesum felagsskapi.

Danski forsætisráðharrin sigur, at teir hava einki ynski um at halda fast uppá nakran, sum ikki ynskir at vera saman við teimum. Men hann heldur tó, at tað eru so nógv søgulig, mentanarlig og familjubond millum føroyingar og danir, at tað er náttúrligt at halda fast um Ríkisfelagsskapin, men leggur aftrat, at tíðin er komin til at nútímansgera hann.

Tá talan er at finna ein leist at ganga eftir, tá málsøki skulu yvirtakast sigur Anders Fogh Rasmussen, at hann hevur ikki enn tikið støðu til, um tað rætta er at broyta Heimastýrislógina ella at gera lóggávu fyri hvørt einstakt øki sær, sum verður yvirtikið. – Eg vil fegin lurta eftir, hvat føroyingar sjálvir vilja, men tað mest einfalda vil vera at broyta Heimastýrislógina. Og verður sett ynski fram um tað, so eru vit sinnaðir til tess. Men eg havi skilt, at føroyingar eru ymiskir á máli um tað. Eru ikki ynski um tað, so ber til at finna onnur modell.

Danski forsætisráðharrin vil annars hava føroyingar meira við í viðgerðina av uttanríkismálum, sum viðvíkja Føroyum. Tá tað eru altjóða samráðingar, sum hava beinleiðis týdning fyri Føroyar, so heldur hann, at umboð fyri Føroyar skulu vera við, hóast tað verður fólkatingið, sum í síðsta enda skal góðkenna møguligar avtalur.

### Blokkurin

Tá tað ræður um blokkin úr Danmark, er tað greiða meiningin hjá Anders Fogh Rasmussen, at hesin er ikki nøkur gáva til føroyingar men eitt gjald til Føroyar at rinda fyri uppgávur, sum eru uppgávur hjá Ríkisfelagskapinum. Tí haldur hann ikki, at støðdin á blokkinum skal lagast eftir, hvussu tað gongur í búskapinum. Gjaldið verður ásett eftir uppgávum, sum føroyskir myndugleikar útinna vegna Ríkisfelagsskapin.

Hann fegnast um, at tað gongur væl í føroyska búskapinum í løtuni men hann heldur ikki, at blokkurin skal minka fyri tað. – Eg havi einki ímóti, at danski staturin sparir nakrar pengar, tá føroyingar yvirtaka, men tað er ikki okkara tørv fyri at kunna spara á fíggjarlógini tað snýr seg um, tá føroyingar vilja yvirtaka málsøki og gjalda fyri tey.

Uppá fyrispurning, hvar munurin millum politikkin hjá Nyrup stjórnini og nýggju stjórnini liggur sigur Anders Fogh Rasmussen, at tað er meira ein spurningur um, hvussu tónin er í samráðingunum. - Vit royna eina nýggja og konstruktiva leið, har vit fyrireika okkum gjølla og væl til at kunna vera partur í eini prosess, har føroyingar yvirtaka mál – og har tað sjálvandi er upp til føroyingar sjálvar at taka avgerð um tað.

Danski forsætisráðharrin heldur ikki, at tað er nøkur orsøk til ósemju, konflikt ella fyri tað konfrontatión millum Føroyar og Danmark eftir hetta. - Um føroyingar vilja yvirtaka, so vilja vit medvirka. Tað er upp til føroyingar sjálvar at taka avgerð um tað og í tí anda vóni eg eisini, at eg havi lagt upp til positiv og konstruktiv viðurskifti millum londini.

Anders Fogh Rasmussen ger í hesum sambandi enn einaferð púra greitt, at tað nú verður upp til føroyingar sjálvar at avgera, hvat man vil yvirtaka ella ikki.

- Hetta má so blíva vera eitt innanhýsis føroyskt stríð, sum eg ikki ætli at leggja meg út í. Vit leggja okkum als ikki út í nakað føroyskt valstríð, tá vit siga, at vit vilja ganga bæði teimum føroyingum at møti, sum vilja yvirtaka nógv og teimum, sum ikki vilja fremja so nógvar yvirtøkur. Í báðum førum vilja vit medvirka til, at tað føroyska fólkið ynskir, verður fullført.

### Løgmaður fegin

Løgmaður, sum er ovurfegin um útspælið frá donsku stjórnini (Sí eisini samrøðu við løgmann í Sosialinum týsdagin, blaðm.) vísir á, at við felags niðurstøðuni frá fundinum í Tinganesi mánadagin ber nú til hjá Føroyum at yvirtaka mál eitt fyri og annað eftir og er hetta eisini í tráð við málsetningin í tí sjálvstýrissamtykt, sum er gjørd á tingi.

- Vit síggja her ein praktiskan hátt at røkka longur á sjálvstýrisleið og vil uppgávan nú liggja heima í Føroyum. Tað er her arbeiðið skal gerast eftir at vit hava fingið staðfest, at hetta kann gerast í samstarvi við donsku stjórnina. Og tað eri eg sera fegin um at hava fingið staðfest.

Løgmaður vísir á, at trupulleikin higartil hevur verið at fáa tey málini, sum ikki eru nevnd í Heimastýrislógini, við í tjakið um yvirtøkur og við hesum nýggja útspælinum frá donsku stjórnini er loyst upp fyri tí.

Anders Fogh staðfestir:

## Føroyingar eiga oljuna

FOGH OG OLJAN
*Jan Müller*

- Rættarstøðan er sólarklár. Hvat viðvíkur ognarrættinum til sjálva undirgrundina, so er tað framvegis Ríkisfelagsskapurin, sum hevur hann. Men ræðisrætturin (ognarrætturin, blaðm.) til møguliga olju í undirgrundini er farin á føroyskar hendur. Tað er hetta, sum liggur í avtaluni. Eg havi onga ætlan um at broyta nakað í avtaluni frá 92.

Hetta eru avgjørdu og greiðu orðini hjá danska forsætisráðharranum, tá Sosialurin spyr hann um tann iva, sum nú í eina tíð er vorðin sáddur bæði í Danmark og í Føroyum um veruliga virðið av avtaluni, sum gjørd varð í 1992. Sambært tí avtaluni verður bæði lóggevandi og fyrisitingarligi myndugleikin yvir møguligum ráevnum í føroysku undirgrundini latin føroyingum.

Anders Fogh Rasmussen er hervið triði danski forsætisráðharrin á rað, sum hevur staðfest, at føroyingar við avtaluni frá 92 eiga rættin til olju og gass í undirgrundini. Fyrst var tað Poul Schluter, sum skrivaði undir avtaluna, síðani varð hon konfirmerað av Poul Nyrup Rasmussen, og nú ger Anders Fogh Rasmussen enn einaferð greitt, at eingi ivamál eru um rættin hjá føroyingum til ráevnini.